# Batar eru at hóma í fiskivinnu

**FISKIFLOTI** - Gongdin hjá fiskiflotanum hevur verið heldur frægari í ár enn undanfarna ár, tó at fleiri skipabólkar framvegis eru hart kroystir fíggjarliga, sigur grannskoðarafyritøkan NOTA í roknskapargreining

Vilmund Jacobsen

Síðan 2005 hevur NOTA gjørt greiningar av fiskiflotanum. Skipini, sum eru við í greiningini, eru línuskip omanfyri 110 tons og trolarar, sum hava maskinorku, ið er skip omanfyri 400 HK. Hetta er samsvarandi flokkingini í lógini um vinnuligan fiskiskap.

Grundarlagið undir greiningini er í fyrsta lagi almennu ársfrágreiðingarnar hjá teimum feløgum, sum eiga skipini, og haraftrat hevur NOTA fingið upplýsingar um nettosølu, veiðinøgdir og annað.

Útróðrarflotin er ikki við, tí tað eru bert fáir bátar, ið eru skipaðir í parta-ella smápartafeløg við skyldu til at lata inn almenna ársfrásøgn.

Greiningin hjá NOTA fevnir annars um allar skipabólkar, og dentur verða lagdur á, at greiningin skal geva lesarunum møguleika fyri at gera sínar egnu niðurstøður.

- Tilfarið er rúgvusmikið og kann greinast á ymiskar hættir, sigur felagið.

### Skiftandi ár

NOTA ásannar, at stórar broytingar eru farnar fram árini 2005 til 2009, sum greiningin fevnir um.

- Sum heild hava tey seinastu árini hjá fiskiflotanum verið sera skiftandi. Talan var um stóra framgongd árini 2005 til 2006. Men árini síðan 2006 hevur fiskiflotin samanlagt havt afturgongd.

Lagt verður aftrat, at árið 2008 kundi sæð út til at verið eitt ár við framgongd, men tað eru tær óvanligu inntøkurnar hetta árið, ið geva positiva úrslitið. Óvanligar inntøkur eru oftast skipasølur, og sjálvandi hevur tað sína ávirkan, tá skip verða seld, og óvanligar inntøkur standast av hesum.

NOTA sigur, at allir skipabólkar høvdu hall í 2008, tá sæð verður burtur frá óvanligum postum, og støðan er nøkulunda hin sama í 2009. Tó hevur uppisjóvarvinnan og bólkurin "onnur skip" megnað at hildið eitt positivt úrslit.

### 2010 frægari

Roknskapargreiningin, sum NOTA legði fram seinasta hósdag, fevnir ikki um 2010, men ábendingar eru um, at árið 2010 verður nakað betri enn 2009 hjá flest øllum skipabólkunum tilsamans.

NOTA plagar nevniliga at brúka hagtøl hjá Føroya Fiskimannafelag til at gera sær eina meting av árinum, vit eru í, og sambært hesum tølum er samlaða veiðivirði í tíðarskeiðnum januar til september 2010 økt samanborið við sama tíðarskeið í 2009.

- Gongdin hjá fiskiflotanum verður tí væntandi betri í 2010, men kortini verða tað tó fleiri skipabólkar, sum eisini í ár eru hart kroystir fíggjarliga, sigur grannskoðarafyritøkan.

*vilmund@sosialurin.fo*

# VEIÐIVI

**FISKIFLOTI** Tað gongur misjavnt hjá fiskiflotanum, men truplast hava heimaflotin og rækjuflotin tað. Hetta vísir roknskapargreiningin hjá NOTA, sum felagið legði fram seinasta hósdag. Í hesi greinini hyggja vit eftir, hvat grannskoðarafyritøkan sigur um ymisku skipabólkarnar

Vilmund Jacobsen

Um uppisjóvarskipini, sigur NOTA, at hesi hava havt nøkur góð ár, men tó vóru 2008 og 2009 ikki eins góð, um sæð verður burtur frá óvanligum inntøkum. Flotin er nøkunlunda konsolideraður, men gjaldførið kundi verið betri.

- Miðalprísurin hjá uppisjóvarskipum er hækkaður munandi fyrstu 9 mánaðirnar í 2010 í mun til sama tíðarskeið í 2009. Samlaða veiðan og samlaða veiðivirði eru eisini økt munandi í ár.

Nota vísir á, at oljuprísurin er hækkaður í 2010 í mun til 2009, og kann hetta verða við til, at úrslitið hjá uppisjóvarskipum verður umleið tað sama í ár sum í fjør.

### Rækjuskip

Rækjuflotin hevur havt nógv trupul ár á rað, og støðan er framhaldandi vánalig við árslok 2009. Í løtuni eru bert trý skip í vinnu.

- Miðalprísurin fyri kilo fyrstu 9 mánaðirnar í 2010 er hækkaður í mun til sama tíðarskeið í 2009. Nøgdin er harafturímóti minkað nakað. Samanlagt er veiðivirðið lækkað fyrstu 9 mánaðirnar í 2010 samanborið við fyrstu 9 mánaðirnar í 2009, sigur felagið.

### Verksmiðjutrolarar

Raksturin hevur verið stabilt góður árini 2004 til 2007, men úrslitið var vánaligt í 2008 og 2009.

NOTA sigur, at verksmiðjuflotin kortini er rímiliga væl fyri við árslok 2009.

- Veiðinøgdin var betri í 2009, men prísurin er enn sera lágur.

Væntandi er, at veiðinøgdin hækkar nakað í 2010 í mun til sama tíðarskeið í fjør. Harumframt hækkar miðalprísurin í ár.

- Oljuprísurin er tó eisini á einum hægri støði í ár samanborið við 2009. Tí kann úrslitið hjá hesum skipabólki frá vanliga rakstrinum væntast at verða betri í ár enn í fjør, sigur NOTA.

### Partrolarar

Úrslitini hjá partrolaraflotanum eru versnaði munandi seinastu 5 árini. Bæði solvensur og gjaldføri eru vánalig við árslok 2009.

- Veiðinøgdin fyrstu 9 mánaðirnar í ár er nakað tann sama sum fyrstu 9 mánaðirnar í fjør. Miðalprísurin er hækkaður nakað í ár í mun til seinasta ár.

NOTA vísir á, at oljuprísirnir eru hækkaðir nakað í 2010, og tí eru ábendingar um, at úrslitið hjá partrolarum verður umleið tað sama í ár sum í fjør.

### Lemmatrolarar

Samanumtikið kann sigast, at fíggjarstøðan hjá hesum skipum ikki er nøktandi. Gjaldførið batnaði nakað í 2009, men er tó ikki nøktandi. Minking í veiðinøgd og miðalprísi árini 2006 til 2009 hevur viðført, at talan er um hall trý fylgjandi ár.

Talið av lemmatrolarum minkað úr 11 niður í 9 skip.

- Skipabólkurin hevur havt eina minking í veiðinøgd fyrstu 9 mánaðirnar í 2010 samanborið við sama tíðarskeið í fjør. Miðalprísurin er tó hækkaður nakað, eins og oljuprísurin er tað eisini.

NOTA væntar, at samanlagt má roknast við, at árið í ár verður heldur lakari hjá lemmatrolarum enn árið 2009, sum greiningin fevnir um.

### Línuskip

Línuskipini hava havt nøkur vánalig ár. Harumframt er miðalprísurin lækkaður munandi í 2008 og 2009, samstundis sum veiðinøgdin er minkað við 35,6% árini 2005 til 2009.

- Vegna minkandi veiðinøgd og miðalprís hevur stór afturgongd verið tey seinasti 5 árini. NOTA sigur, at línuskipini hava merkt eina framgongd í veiðinøgd fyrstu 9 mánaðirnar í ár samanborið við somu tíð í 2009, eins og

# Minkandi tal av fiskimonnum

**Síðan 2005 er talið av ársverkum í føroyska fiskiflotanum minkað við meiri enn 20%**

Vilmund Jacobsen

Sambært roknskapargreiningini yvir fiskiflotan, sum Nota hevur gjørt, minkar talið av ársverkum í føroyska fiskiflotanum alsamt.

Meðan ársverkini í 2005 vóru 1.086, vóru tey í 2009 komin heilt niður á 865. Minkingin hesi árini var soleiðis meiri enn 20%.

Í 2005 vóru tilsamans 1.086 ársverk í fiskiflotanum, í 2006 var talið 1.072, í 2007 1.030, í 2008 vóru tey 883, og í 2009 vóru tey komin heilt niður á 865.

Eisini í 2009 eru tað línuskipini, sum hava flestu ársverkini, síðan koma partrolarar og verksmiðjuskip.

Men tað eru ikki bara ársverkini, sum eru minkað í tali hesi árini. Tað eru skipini eisini.

Greiningin hjá Nota fevnir um flestu skip í føroyska fiskiflotanum. Bert nøkur fá skip eru ikki við, og tí gevur greiningin eina greiða mynd av støðuni.

*vilmund@sosialurin.fo*

